# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt tjóðskaparligt frambrot

Flagg okkara Merkið hevur heilt frá tí, at tað var skapað í útlegd fyri út við níti árum síðan, nomið við sterkar kenslur í føroyingum og hevur elvt til ógvusligar tjóðskaparligar og politiskar kreppur. Merkið er saman við móðurmálinum ein hin sterkasti tátturin í føroyskum samleika. Føroyskur samleiki er eins og samleikin hjá flestu europeiskum tjóðum undir trýsti. Altjóðagerðin noyðir smátjóðirnar at endurskoða samleikan og finna hóskandi strategiir til tess at verja og menna hann uttan at enda í avbyrging og sjavinismu. Hetta er ein eins týdningarmikil sum torførur setningur. Norðurlond hava megnað setningin væl, meðan onnur europeisk lond als ikk hava megnað at handfara ta vaksandi tjóðskaparkensluna.

Tað er við hesum baksýni feskasta flaggmálið skal síggjast. Flaggstríðið var so beikst og so drúgvt, at meirilutin av føroyingum heilt einfalt ikki góðtekur nakað, sum bert kann tulkast sum eitt afturstig, mett út frá hesum drúgva flaggstríði. Hugsa vit soleiðis, so er lætt at skilja, at fólk reagera og tala harðliga at. Í slíkum førum hevur myndugleiki lítið annað val, enn at lurta og fara í sakligan dialog við sjálvan seg eins væl og við atfinnaran. Tað er júst hetta, ið løgmaður hevur gjørt, og hetta tænir honum til miklan heiður. Hetta er eitt mál, har allir føroyingar uttan nakrir heilt fáir eru samdir og bera somu kenslur. Í slíkum førum hjálpa køld rationel argument og løgfrøðiligir teknikalitetir ikki. Føroyingar góðtaka heilt einfalt ikki, at tað verður bakkað, og tað er við flaggsøguni í huga væl skiljandi.

Málið um flaggið í Reykjavík var um at gerast ein politiskur trupulleiki fyri løgmann. Tað rumblaði í samgonguni, og størsti andstøðuflokkurin gjørdi sær, sum vera man, meira enn dælt av støðuni. Løgmaður hevði tí einki í vali enn at taka málið uppaftur við danskar myndugleikar. Alt bendir á, at hann her hevur havt eina sera hepna hond, hann hevur vunnið í virðing og metum manna millum, og hetta mál má tí metast at verða endaliga avgreitt. Eftir stendur ein spurin almenningur: Hví kundi henda loysn ikki verða funnin frá fyrsta degi? Hví var hendan loysn ikki rokkin við sendistovunum í Bruxelles og í London. Hevur løgmaður fingið nóg holla og dygdargóða fakliga ráðgeving frá síni fyrisiting. Hesar spurningar eigur løgmaður at seta sær og síni fyrisiting og geva almenninginum svar. Málið endaði sum eitt tjóðskaparligt frambrot og tí eiga vit at ynskja løgmanni tilukku við óvæntaða og góða endanum á feskasta men valla seinasta føroyska flaggstríðnum.

**Sosialurin**

## Gjógvin má minkast

**HANS JOENSEN**
formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag



**Skattur: Stundin er komin at arbeiðsfólk, við eini vanligari arbeiðarainntøku fáa skattalætta. Tað er skattalætti, sum ikki hitar nakran búskap, og sum er harðliga tiltrongdur**

Sitandi samgonga hevur latið fleiri skattalættar, men fólk við eini vanligari arbeiðarainntøku hava lítið og einki fingið burtur úr hesum skattalættum - og so slettis einki samanborið við hægru inntøkurnar.

Kravið er tí, at ein skattalætti fyri komandi ár má koma lægru inntøkunum til góðar. Tað er átaluvert, at sitandi samgonga áhaldandi letur skattalættar til fólk við góðari inntøku.

Sambært skattalóg samgongunnar fær ein persónur við eini vanligari arbeiðaraløn (207.000 kr) einans 700 kr í skattalætta komandi ár meðan ein persónur, ið tjenar tað dupulta, fær 6000 kr í skattalætta.

Hetta er órættvíst, og er við til at gera Føroyar til eitt stættarsamfelag, har tey lágløntu eru fyri vanbýti.

Fakfeløgini gjørdu í desember 2006 eitt alternativt uppskot til skattalætta. Eg vil heita á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at evna eitt nýtt uppskot til skattalætta fyri 2008, sum byggir á meginreglurnar í tí uppskotinum. Tað er skattalættin, sum eigur at latast í 2008 - og tað er ein tiltrongdur skattalætti.

## Traumatisk plága & lemjandi marra hjá Javnaðarflokkinum

**VIRGAR T. DALSGAARD**



Tað má fara glerkalt niður eftir bakinum á javnaðarløgmanninum, Jóannesi Eidesgaard í dag, nú hann í bløðunum verður róstur og herðaklappaður, ikki bara av einum innantómum handilsdrongi í Havn, harra Pouli Mikkelsen, men eisini av betongdronginum, harra Høgna Hoydali, formanni fyri tjóðveldismeinigheitini.

Einhvør formaður í javnaðarflokkinum hevur til henda dag ikki ynskt nakrar rósur frá slíkum fólki, og sum *Petur Mohr Dam,* sáli plagdi at taka til, at so leingi tjóðveldismenn spiltu hann út, visti hann, at politikkur hansara var bæði rættvísur og skilagóður, og hann ynskti ikki at uppliva tann dag, har teir ábyrgdarleysu smokkuleggarnir í tí flokkinum róstu sær fyri nakað sum helst. Tað hevði verið verri enn at verið fevndur av lummatjóvum!

Men tað er ikki løgið, at hesir báðir politisku charlatanar skammrósa løgmanni, tí ætlar løgmaður, sum Dimmalætting boðar frá, at beina fyri blokkinum, beinir hann samstundis fyri teimum pengaveitingum, sum Javnaðarflokkurin við Petur Mohr Dam á odda bardist fyri at fáa føroyska fólkinum í 1958, og tað legði lunnarnar undir modernaða føroyska vælferðarsamfelagið.

Hetta vórðu oyramerktir pengar til social mál, sjúkrahús v.m.. Seinni hava fólk við bókhalds-skríða tikið hesar pengar út av teimum røttu socialu konti og sett tær í ein blokk.

Men hetta høvdu tey ongan moralskan rætt til. Blokkpengarnir vóru skaffaðir til føroyska samfelagið til ávís endamál, og tað er tí næstan stuldur, tá ið politikkarar og embætismenn seinni hava sett blokkin fyri seg og brúkt hann til heilt ”onnur endamál”.

Tað er púra óforstáiligt, at ein javnaðarløgmaður, uttan at tað hevur verið viðgjørt á landsfundi, fer út og proklamerar, at blokkurin skal skerast niður við so stuttum skotbrái sum átta ár. Tað vil siga, at javnaðarfólk skullu noyðast at svølgja tann herskna bita, at júst tann peningur, sum javnaðarflokkurin bjargaði ´Føroyum, - henda hartvunna peningaliga rættin, skullu vit nú, sum forkelaðir smádreingir blaka danskarum aftur í høvdið. Hvat er hetta fyrio politikkur? Hettta kann jú, sum frá líður, gerast ein social katastrofa.

Vit fingu hesi socialu rættindi frá Danmark í 1958. Menn mettu tá, at føroyska samfelagið var eitt so orkulítið veiðumannasamfelag, at tað aldri kom at orka ta socialu ábyrgdina, tí fíggjarmegin var for lítil millum færri enn 100.000 íbúgvar.

Hetta faktum er enn meira galdandi í dag, enn tað var tá. So hetta kann gerast tann tunga_leiðin afturí feudalu olmussutíðina hjá Jóannesi Patursson, óansæð hvat tann kommercielli filosoffurin, harra Poul Michelsen mátti kunna koma við av naivum tvangstankum, fyri ikki at tosa um betongdrongin, sum dugir líka illa at rokna sum Poul.

Vónandi meinti tú, Jóannes løgmaður, ikki tíni orð, soleiðis sum hesir báðir ábyrgdarloysingar hava fata tey! Vit javnaðarfólk bíða spent eftir svari, tí nú stendur á gomlum nøglum!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diski.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.